# Køkur á jólamerkjum

Tað er enn tann dag í dag siður í Føroyum, at tú ikki bert jólini út aftur, og tískil verður tað mett ófólkaligt, fert tú avstað uttan at smakka tað, tær verður boðið.

Frímerkjadeildin hevur framleitt ein bókling við uppskriftum til allar 30 køkurnar, sum eru avmyndaðar á jólamerkjaarkinum. Allar uppskriftirnar eru væl og virðiliga royndar fyri at úrslitið skuldi verða best møguligt. Longu í mai mánað fóru starvsfólk á Frímerkjadeildini undir at baka smákøkur fyri at finna fram til hvørjar uppskriftir skuldu við í bóklingin. Úrslitið er so hesin bakibóklingur, sum fæst saman við jólamerkjaarkinum.

Sjálvt arkið er eisini prýtt við køkum, og er tað listamaðurin, Edward Fuglø, ið hevur teknað hesar.

Tey sum hava vitjað posthúsini kring landið í desember mánað, hava helst lagt til merkis at posthúsini eru prýdd við smákøkum, og at heimabakaðar smákøkur og kaffi hava staðið frammi til viðskiftafólkini. Uppskriftirnar, sum nýttar eru, eru sjálvandi úr bakibóklinginum.




























